

*Natsja Crone er vertur í stóri kappingini hjá Danmarks Radio, »Stjørna fyri eitt kvøld«, har føroyingar eisini luttaka. 17. januar verður 3. partur sendur*

*Kasper Bonde, Mia jensen, Nina Leinum Nørgaard, Promila Jespersen og Tarek Sidki skulu kappast um at gerast Stjørni fyri eitt kvøld hesaferð*

# Stjørna fyri eitt kvøld

**Natsja Crone er klár – beinleiðis úr tí festliga upptøkuhølinum, Studio 3 í TV-býnum við fimm nýggjum luttakarum í kappingini »Stjørna fyri eitt kvøld«. Við sangtalenti og útstráling skulu hesir fimm luttakarar kappast um tokka hyggjaranna. Tí tað eru hyggjararnir, ið gera av, hvør skal vera kvøldsins stjørna**

Teir fimm talentfullu amatørarnir, sum hetta fríggjakvøldið skulu royna seg í kappingini, skulu syngja »live« við tónleikabólkinum hjá Joakim Pedersen, All Stars, eru:

Kasper Bonde er 26 ára gamal, útbúgvin tónleikalærari frá musikkkonservatoriinum í Aalborg. Kasper skrivar sjálvur sangir og hevur sungið í ymsum lokalum bólkum. Umframt at syngja og skriva tónleik, so brúkar Kasper eisini tíðina upp á at spæla flogbólt. Tað er ikki fyrstu ferð, at Kasper er við í sjónvarpstónleikasending. Í 93 tók hann lut í Ungdóms Grand Prix kappingini hjá DR, ta ferðina send í ungdómssendingini, Zig Zag.

Promila Jespersen er 18 ár. Hon er úr Dianalund. Promila er fødd í India, men hevur búð í Danmark síðani hon var eitt ár. Hon elskar at syngja og dansa – Promila hevur gingið til showdans í eitt ár og hevur havt tónleik í tvey ár á eftirskúlanum, hon gekk á. Fyrstu ferð hon trein á pallin við sangi, var í sætta flokki, har hon sang solo - ein framførsla, sum gjørdi, at hon kom í lokala blaðið.

Nina Leinum Nørgaard er 24 ár og úr Keypmannahavn. Hon er fødd og uppvaksin í Hanning við Skjern, men flutti til høvuðsstaðin, tá hon var 19 ár. Hon er í útbúgving sum jarðarmóður og er í løtuni í praktikk á føðideildini á Glostrup Hospitali. Nina hevur sungið, síðani hon var lítil, tá hon saman við allari familjuni fór út at syngja, tá pápi hennara skuldi tala í missiónshúsum kring um í landinum.

Tarek Sidki er 18 ár og úr Esbjerg. Tarek er føddur og uppvaksin í Varde, men er júst fluttur til Esbjerg fyri at ganga á MGK – tónleikaútbúgving, sum skuldi givið honum møguleikar at komið víðari innan tónleikaheimin. Umframt sangtalentið hevur Tarek eisini eitt stórt talent fyri at spæla vatnpolo. Ein av hansara størstu upplivingum var, tá hann saman við sínum totalt undirmetta liðið vann Danmarksmeistaraheitið við einum einkultum máli.

Mia Jensen er 20 ár og úr Horsens, har hon er í ferð við at útbúgva seg sum bygningsmálara. Mia fæst við tónleik frá fimmti-, seksti- og sjeytiárunum, og hon lýsir seg sjálva sum einasta kvinnuliga Elvissangara í Danmark. Og okkurt er helst um tað – hon hevur veriið bæði í Se og Hør og í fleiri bløðum, har hon er blivin kallað Elvis Mia. Hon droymir um einaferð at fara til Memphis og vitja heimið hjá Elvis, Graceland.